# Willieboys á barnasjónleikarferð

**Aftur í ár fer leikbólkurin Willieboys við Gutta Winther og Kjartani Hansen at ferðast við barnasjónleiki.**

TÍÐINDASKRIV

Leikurin fer at snúgva seg um Dólghanus, og um hvussu hann fekk prinsessuna - men tó als ikki sum í ævintýrinum. Leikararnir, Gutti Winther og Kjartan Hansen, hava, saman við leikstjóranum, Elini á Rógvu, broytt ferðina hjá Dólga-Hanusi og tillagað hana børnum í 4 – 10 ára aldrinum í dag. Í staðin fyri ein geitabukk eigur Dólghanus eina trillubøru, fulla í sangi, einum bláum hundi og eini flogternu. Ætlanin hjá Dólghanusi er at ferðast út á barnagarðar og stovnar í tíðarskeiðnum 6. til 17. mars.

# Ung í Føroyum 2006 av bakkastokki

**"Takk at eg slapp við", "Ung í Føroyum rular", "Góðu, veljið meg"... eru nakrar av viðmerkingunum, sum tey ungu hava skrivað á tekningarskjølini, nú fimm ár eru liðin, síðani tiltakið Ung í Føroyum varð sett á stovn**

TÍÐINDASKRIV




Komandi vikuskiftið verður Ung í Føroyum 2006 í Norðurlandahúsinum. Hetta vikuskiftið fara 70 ung í aldrinum 13 til og við 18 ár at arbeiða í 7 ymsum listaverksmiðjum. Endabresturin verður sunnudagin kl. 17:00 í Norðurlandahúsinum, tá ein almenn sýning verður á pallinum og stór listaframsýning verður at síggja. Hvat innihaldið í hesi sýningin verður, er enn púra ókent, tað verður skapt á sjálvari stevnuni. Stevnumiðið hjá Ungum í Føroyum er at lofta teimum tankum og hugskotum, okkara ungu listafólk brenna fyri, geva teimum best hugsandi umstøður og bestu vaknsu listafólkini sum vegleiðarar, og síðan lata dyrnar á største mentanarstovninum í landinum upp fyri teimum. Ferð eftir ferð hevur úrslitið víst seg at vera av stórari listarligari dygd, og at hetta er eitt innihaldsyvirlit yvir, hvat ung sjálvi hava hug at vísa og ikki minst, hvussu væl tey duga, tá umstøðurnar eru tær bestu.

Listarliga vegleiðararnar hesuferð eru Mikkjal Helmsdal, sjónleikur, Heri Joensen og Kári Sverrison, tónleikur, Rannvá Káradóttir og Kristina Sørensen Ougaard, dansur, Svanhild Strøm, sniðgeving, Sigga Vang og Gudmund Nielsen, filmslist og Ingi Joensen, foto.

Samskipari av sunnudagssýningini er Ria Tórgarð. Í felag hava ungu luttakarar, verksmiðjuleiðarar og Ria valgt orðið ella hugtakið spegil sum tema fyri sýningini. Hendan er ætlað vinfólkum og teimum, sum kanska hava umhugsað at vera við einaferð, men eisini skal hon vísa mentanarmynduleikum, lærarum í listagreinum og politikarum, at ung duga, bara tey fáa umstøðurnar og at tað loysir seg at gera íløgur í ungari mentan.

Mentamálaráharrin er eins og á undanfarnum Ung í Føroyum stevnum, verndari hjá tiltakinum. Norðurlandahúsið skipar fyri í samstarvið við Mentamálaráðið og kommunurnar í Fuglafirði, Runavík, Klaksvík, Leirvík og Vágum. Føroya Banki er høvuðsstuðul.

Atgongumerki eru at fáa í Norðurlandahúsinum og í kunningarstovunum í Runavík og í Havn.

Ein ungur tíðindabólkur er eisini á stevnuni, og alt vikuskiftið verða tíðindi og myndir lagdar út á heimasíðuna hjá Ungum í Føroyum, www.ungiforoyum.info.

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Lena gevur nýggja fløgu út í vár

Seinastu ferðirnar Lena og Niclas hava verið í Føroyum, hava tey nýtt nógva tíð í upptøkuhølunum. Eitt nú hava tey í fleiri vikur tikið upp í Útvarpinum. Nú váttar Lena á heimasíðu síni, at úrslitið verður ein fløga, ið verður útgivin í Føroyum í vár.

Hetta er bert nakrar mánaðar eftir, at Can't Erase It var givin út í Danmark og aðrastaðni úti í heimi. Síðan útgávuna av fløguni hevur Lena spælt nógv í Danmark, og tað skilst, at marknaðarføringin av Can't Erase It heldur fram sum áður. Serliga lagið Step On The Gas hevur verið nógv at hoyrt í donskum útvarpi, og í næstum sleppa danir at uppliva enn eina útvarpssinglu, tað verður tittullagið fløguni Can't Erase It. Meðan føroyingar longu kunnu byrja at gleða seg til nýggju útgávuna.

**nud**




Starvsfólk
TIL BURGER KING Í SMS

Fulla tíð

Søkt verður eftir fólki M/K sum er 18 ár ella eldri, til at arbeiða fulla tíð – at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Her er nógv at gera. Tú mást vera før/ur fyri at hava nógvar „bóltar í luftini" samstundis. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

Send umsóknina til:
Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.
ella far inn á sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal

BURGER KING

LEIÐARI TIL NONE-FOOD DEILDINA
Í NÝGGJA MIKLAGARÐI SØKIST

TÍNAR ARBEIÐSUPPGÁVUR ERU:
At keypa inn, prísáseta, seta vørur upp, gera og halda fíggjarætlan, og hava starvsfólkaábyrgd.

Best er, um tú hevur kunnleika til hetta starvsøkið, tú mást vera røkin, opin, og sera ágrýtin. Tú mást vera til reiðar at leggja eina rúgvu av orku og ómak í starvið.

Løn sambært avtalu.

SEND SKRIVLIGA UMSÓKN TIL:
Miklagarður Att: Johnny Priess, Postboks 1059, 110 Tórshavn

Eru spurningar, kanst tú ringja til Jonny tel. 28 30 11

MIKLAGARÐUR